# Seinastu jól í Koltri

**Hetta verða seinastu jólini við Bjørn og Lükku Patursson sum uppisitarum í Koltri. Tað er vi eitt sindur av sorgblídni, at vit halda jól í ár, sigur Lükka Patursson**

Hetta er 12. árið, at hjúnini Lükka og Bjørn Patursson halda jól sum uppisitarar í Koltri.

Vit halda jól eins og øll onnur. Í ár verða báðar døturnar við familju her úti og halda jól saman við okkum, sigur Lükka Patursson.

Traditionellu jólini byrja við, at øll fara at ambæta krýatúrunum. Men áðrenn tað fara øll í Sodnhúsið, har »vættrarnir« hava verið og pynta.

Har hugna vit okkum so saman við børnum og ommubørnum við jólasøgu, áðrenn vit fara at eta jólagásina jólaaftan. Vit hava vistfrøðiligar dunnur, sigur Lükka Patursson.

Fyrsta jóladag halda tey gomlu føroysku traditiónina við at eta kókað ræst kjøt.

Einasti munurin á okkara jólahaldi og á størru plássunum, er at vit ikki hava nakran at vitja. Afturfyri gera vit alt saman, sigur Lükka Patursson, sum saman við manninum, døtrunum og versynum og trimum ommusynum fer at halda eini seinastu kensluborin jól í Koltri.

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Á hvørjum ári hava vættrarnir pyntað í Sodnhúsinum. Har inn vitja tey altíð áðrenn døgurðan jólaaftan*

















